DAGSINS MEINING

Nøgdsemi besta borgan fyri góðum úrsliti

Verkfallið er av. Eftir at hava verið í verkfalli í skjótt tríggjar vikur fóru limirnar hjá Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðskvinnufelag aftur til arbeiðis mánamorgunin. Og við hesum fara samfelagshjólini aftur at mæla við fullari ferð, her ikki minst vinnulívið, te. fiskiflotin, fiskiídnaðurin og alingin. Tær forðingar, sum hava verið hjá útflutningsvinnuni, eru nú við eitt ruddaðar av vegnum.

Hvat kom so burtur úr verkfallinum kann verða spurt – hvat fingu verkfallsfólkini burtur úr tá avtornaði! Eitt og hvørt verkfall hevur sín prís, og henda prís koma allir partar at gjalda, eisini limirnir í fakfeløgunum, sum hava mist part av sínum inntøkum. Men hetta stríð hevur kortini ikki verið til fánýtis, tí eitt av høvuðsmálunum undir samráðingunum frá byrjan hevur verið at fáa vanligum arbeiðsfólki eina lønarskipan við starvstíð, nakað, sum jú er galdandi fyri aðrar lønarbólkar, eitt nú fyri tey, sum arbeiða hjá tí almenna.

So tað er greitt, at Ingeborg og Vígdis her hava vunnið ein sigur, nú arbeiðsfólk fáa nakað omaná vanligu lønina, tá tey hava verið so og so leingi á einum arbeiðsplássi. Og neyvan munnu tað vera mong, sum ikki unna teimum hetta. Hví skulu ikki arbeiðsfólk eisini hava henda rættin, tá stórur partur av fólkinum hevur hann! At so lønarhækkingin ikki gjørdist tann, sum arbeiðarafeløgini høvdu sett sær sum mál er so eitt úrslit av, at arbeiðsgevararnir máttu geva seg í starvstíðarmálinum.

Tað er greitt, at verkfallið hevur kostað hjá bæði vinnulívi og limum í fakfeløgunum. Tað er tó at fegnast um, at hjólini nú aftur eru farin at mæla. At arbeiðsgevararnir nú eisini fara at geva hinum arbeiðarafeløgunum, sum gjørdu sáttmála herfyri, somu ábøtur viðvíkjandi starvstíð, er so eitt tekin um, at stríðið hjá FA og HAK hevur gagnað allari arbeiðarafjøldini í landinum.

Hetta seinasta er kanska tað, sum eigur at fáa umboðini fyri ymsu fakfeløgini at sessast saman og fáa lagt alt persónligt og fakfelagsligt agg og briksl til síðus. Tað tænir hvørki arbeiðarafjøldini ella tí føroyska samfelagnum, at fakfeløgini ikki standa saman, tá tey skulu krevja javnbjóðis rættindi við aðrar borgarar í samfelagnum. Tí skal tað vera okkara áheitan á feløgini um at brúka komandi tvey árini til at finna saman við tí fyri eygað at draga eina og somu línu. Tað tænir heldur ikki arbeiðsgevaranum, at fakfeløgini standa spjødd, tí fyri hann má tað vera rudduligast og best at hava eins sáttmálar fyri alla verkmannafjøldina og ikki nakrar sersáttmálar fyri nøkur arbeiðarafeløg og aðrar fyri onnur.

Hóast vit øll røkja ymisk áhugamál, so eru vit í seinasta enda øll í sama báti. Í einum demokratiskum samfelag sum tí føroyska og í einum samfelag, sum hevur megnað at menna vinnulív og arbeiðspláss so væl sum tí føroyska, eigur at verða pláss fyri øllum, eisini at betra umstøður og rættindi hjá starvsfólkinum. Málið má vera nøgd arbeiðsfólk og starvsfólk, tí í síðsta enda er tað besta borganin fyri einum góðum úrsliti.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Skelkandi politisk stempling av Vestmanna skúla

Hans Pauli Strøm, Vestmanna,
løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin

Skelkandi at landsstýrismaðurin í mentamálum óátalaður skuldsetir skúlaleiðslu fyri partapolitiskt valstríð

Tað er ein sjúkligur einræðisandi, sum Tórbjørn Jacobsen, landsstýrismaður í mentamálum, avdúkar í samrøðu í Sosialinum leygardagin. Táið øll skúlaleiðslan í Vestmanna stígur fram og ger vart við, at tey eru komin í stórar trupulleikar av tí at ov fáir tímar eru játtaðir til fólkaskúlan, so verða tey høgd niður av landsstýrismanninum, skírd fyri dugnaloysingar, politiskir provokatørar og partapolitiskir lakaiar fyri ein tingmann í bygdini.

Ábyrgdarfult hevur henda skúlaleiðslan røkt sítt starv og roynt at fingið endarnar at røkka saman. Ábyrgdarfult venda tey sær nú til almenningin og greiða frá, at í teirra skúla og aðrastaðni við í fólkaskúlanum er játtaða tímatalið ov lítið, til at tey kunnu røkja allar tær skyldur, sum lógin áleggur teimum, og sum næmingarnir og foreldrini kunnu krevja av teimum.

Landsstýrismaður tænari ella bøðil?

Landsstýrismaðurin skilir hetta ikki og tolir tað ikki, hann tekur tað sum eitt persónligt fornermilsi og politiskt álop á hann. Hann hevur gloymt, at ein landsstýrismaður eigur at vera fólksins tænari - ikki harri. Og at landsstýrismaðurin í skúlamálum tí eigur at lurta eftir hvat skúlafólkini siga, royna at skilja teirra støðu – hann eigur at vera teirra fremsti tænari – ikki teirra dómari og bøðil.

Men júst so reagerar landsstýrismaðurin og heglar tey niður: ”At tað ikki hongur saman í Vestmanna skúla man bera boð um, at leiðslan ikki er nóg dugnalig at fáa tað at hanga saman, og at politisk motiv liggja aftanfyri.”

Sum úr stalinistiskum ákæruriti

Grundgevingin hjá landsstýrismanninum er skelkandi, sum eitt óhugnaligt endurljóð úr stalinistiskum ákæruriti: ”Um tú hyggur at, hvør starvast í Vestmanna skúla, ber beinanvegin til at leggja tvey og tvey saman og finna útav, at politisk motiv liggja aftan fyri. Hetta er onki annað enn tað reina valstríð fyri Javnaðarflokkin...Alt málið er ein stórri ætlan í einum valstríði fyri Javnaðarflokkin... Hetta er ikki annað enn tann reina propaganda hjá Sosialinum og Javnaðarflokkinum”.

Hetta sinnisliga skammlopið hjá landsstýrismanninum kemur av, at hann veit, at ein av teim 21 lærarunum í Vestmanna skúla er gift við javnaðartingmanni! Á tann vanvirðing og niðurgerð av skúlastjóranum, báðum varaskúlastjórunum, øllum lærararáðnum, av allari skúlanevndini, av foreldrinum og í veruleikanum av allari bygdini !

Var løgmaður løgmaður, setti hann landsstýrismannin uppá pláss !

Eg haldi henda atburðin móti embætisfólki og starvsfólki í fólkaskúlanum verða so ósømiligan, at ein landsstýrismaður eigur ikki óátalaður at kunna loyva sær slíkt – ja, tað er so langt uttan fyri alt mark, at tað átti at fingið avleiðingar fyri landsstýrismannin. Sjálvandi átti løgmaður at reagera av sínum eintingum og kravt av landsstýrismanninum, at hann í stundini gav hesum fakliga útspiltu og politiskt mistonkiliggjørdu skúlafólkunum eina treytaleysa umbering. Men tíverri er skilið so, at tað er onginið væntar nakað av løgmanni, hann letur alt um seg ganga. Fyri honum kann hesin ólátaði landsstýrismaðurin bara blíva við at gartera, sum honum lystir.

Grýtulappar, handverk og list

Í samrøðuni í Sosialinum avdúkar landsstýrismaðurin eisini eina reaktionera chauvinismu, tá hann niðurger lærugreinina handverk og list til kventasligt fjant og fjas. Landsstýrismaðurin hevur hoyrt, at skúlaleiðslan ikki longur vil skarva av lærugreinini handverk og list, sum gjørt hevur verið í fleiri ár fyri at fáa tímatalvuna at hanga saman, og nú umhugsar heldur at skera av øðrum lærugreinum. Men ístaðin fyri at royna at skilja boðskapin í tí, sum skúlaleiðslan sigur, er einasta viðmerkingin hjá landsstýrismanninum: ”Eg skilji ikki, hví dreingirnir í Vestmanna skulu sita og binda grýtulappar í staðin fyri at læra føroyskt.”

Niðurgerð av teim skapandi og mentandi lærugreinunum

Fyri tað fyrsta er tað neyvan nakar vandi fyri, at bæði dreingir og gentur í Vestmanna ikki skulu fáa sínar tímar í føroyskum og læra tað væl og virðiliga.

Fyri tað næsta er tað merkiligt, at júst landsstýrismaðurin í mentamálum so háðandi niðurger lærugreinini handverk og list til ”at sita og binda grýtulappar”. Í álitinum til nýggju fólkaskúlalógina verður tann nýggja lærugreinin handverk og list annars lýst sum ein samskipan av ”teim skapandi/mentandi lærugreinunum”: tilevning, tónleikur, handarbeiði, smíð og heimkunnleiki. Nevndin, sum handaði álitið í 1996, má sigast at hava havt størri mentunarligt víðskygni enn núverandi landsstýrismaður í mentamálum. Hon skrivaði m.a. tá ”at tær skapandi/mentandi lærugreinarnar nátúrliga eiga at fáa rúmari ræsur og størri gyrði, enn tær hava í verandi fólkaskúlalóg”. Tað áttu tær at fingið við handverk og list í nýggju fólkaskúlalógini. Tað heldur skúlaleiðslan í Vestmanna eisini eftir øllum at døma. Men landsstýrismaðurin er ikki komin longur enn at halda, at hetta er bara grýtulappar, sum raskir dreingir ikki skulu sita og fjasa við.

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

VIÐMERKINGAR

Tímajáttanin til Vestmanna skúla

Føroya Lærarafelag hevur hesar viðmerkingar til greinirnar í Sosialinum og Dimmalætting leygardagin 26. mai 2001 har landsstýrismaðurin í mentamálum ger viðmerkingar til tímajáttanina í Vestmanna skúla .

Tímajáttanin

Tey seinastu nógvu árini hevur tímajáttanin til fólkaskúlan ikki verið nøktandi. Heldur ikki skipanin, sum tímarnir verða tillutaðir skúlunum eftir, hevur verið nóg góð, og tí hevur nógv tjak verið um hesi viðurskifti, síðan hendan skipan varð tikin í nýtslu fyrst í 90unum.

Uttan at fara í smálutir um frymilin, sum verður nýttur at luta tímar eftir, so kann í stuttum sigast, at hann byggir á næmingatal heldur enn flokkatal, og tí eru skúlar, sum ikki hava fult næmingatal, t.v.s. 24 næmingar í hvørjum flokki, við skerdan lut í mun til teir stóru skúlarnar, sum hava fullskipaðar flokkar. Harvið er ikki sagt, at teir stóru fáa ov nógvar tímar. Frymilin er ongantíð dagførdur ella endurskoðaður, men tað finnast óivað skjøl í MMS, sum viðvíkja hesum máli , tí fleiri skúlaleiðarar hava víst á ymiskar skeivleikar og møguligar ábøtur, sum kundu gerast á frymilin. Eisini hevur ein arbeiðsbólkur skriva eitt álit, sum viðgerð hesar trupulleikar.

Tað er eyðsæð, at táið vit hava so ymiskar skúlar í landinum, hvat viðvíkur stødd, næmingatali, flokkatali o.s.fr., er tað sera truplult at finna eina skipan, sum kann taka hædd fyri øllum hesum undir einum. At so røddirnar hjá fleiri skúlaleiðarum eru tagnaðar hesum viðvíkjandi, er sera harmuligt, men væl skiljandi, tá einki hendir í málinum.

Tíma- og lærugreinabýtið

Eitt annað, sum skúlarnir skulu halda seg til, tá ið teir leggja tímatalvuna tilrættis, er tíma- og lærugreinabýtið. Tímatalið, sum flokkarnir á teimum einstøku flokksstigunum skulu hava, er ásett við lóg. T.d. skal 1. flokkur hava í minsta lagi 18 tímar um vikuna og 2. flokkur 20 tímar.

Hetta skulu skúlarnir halda.

Harafturat skulu skúlarnir halda tíma- og lærugreinabýtið, sum seinast varð dagført í 1998 í samband við nýggju fólkaskúlalógina, sum varð samtykt í løgtinginum 1997.

Tíma- og lærugreinabýtið ásetur, hvussu nógvar tímar t.d. føroyskt, danskt, stødd frøði, handverk og list skulu hava á teimum einstøku flokksstigunum. Tó hava skúlarnir eitt ávíst frælsi sjálvir at raðfesta og flyta tímar millum flokksstigini.

Her er tað, at trupulleikin við teimum handaligu lærugreinunum stingur seg upp. Teir flestu skúlarnir í landinum hava sokallaðar p-fak skipanir í teimum handaligu lærugreinunum, har næmingarnir eru býttir sundur í bólkar, sum síðani skifta millum lærugreinarnar. Men skulu skúlarnir hava eina nøktandi undirvísing í hesum lærugreinum, so at hvør einstakur næmingur fær nakað burtur úr, er tað av alstórum týdningi, at tikki ov nógvir næmingar eru í hvørjum bólki.

Longu áðrenn leiðbeinandi lesiætlanin í handverk og list varð gjørd, varð vístá, at lógin kravdi, at undirvísingin í handverk og list skuldi økjast í samanborið við lógina frammanundan, og tí var neyðugt, at tímajáttanin varð dagført, so skúlarnir fingu fleiri tímar.

Tíverri var játtanin ikki dagførd samsvarandi, og tí hava vit eina skipan, sum á flestu skúlum sær góð út og ber til á pappírinum, men í veruleikanum langt frá er nøktandi, tí næmingatalið í bólkunum er ov høgt.

Javnstøðan

Fólkaskúlin skal ikki gera mun á kynunum báðum. Gentur og dreingir skulu hava somu tilboð. Hetta merkir, at bæði gentur og dreingir skulu hava træsmíð, hondarbeiði, evning og tónleik í minst 5 skúlaár. Harafturat kann tað standa teimum í boðið at velja lærugreinarnar í 8. 9. og 10. flokkunum.

Tær av Mentamálastýrinum góðkendu lesiætlanirnar, sum hvør skúli hevur, útgreina, hvat næmingarnir skulu gera, læra og leggja dent á í einstøku lærugreinunum.

Og at lærarar og leiðarar í fólkaskúlanum vita, hvat teir gera og velja at leggja dent á, eigur landstýrismaðurin at hava álit á, heldur enn at niðurgera eitt nú tað at binda grýtulappar.

Tímatalið til Vestmanna skúla

Um tímatalið til Vestmanna er nøktandi, er svarið sera einfalt. Nei, tað er tað ikki. At tímatalið er á leið tað sama, sum seinasta skúlaár, rættar ongan skeivleika. Játtaða tímatalið er heilt einfalt ov lágt at halda undirvísingina á tí støðið, sum leiðslan metir seg at kunna forsvara, og hesum hava tey í brævi til MMS, dagfest 5. mars í ár, gjørt vart við.

Vanlig siðvenja er, at sendir tú eitt bræv ella eina umsókn, so fært tú eitt svar ella eina frágreiðing uppá teir spurningar, sum settir verða fram. Vestmanna skúli fær einki svar. Tey verða tagd burtur. Goymd í onkrari skuffu saman við øðrum, sum hava vístá ella arbeitt við at bøta um viðurskifti í fólkaskúlanum, so vit hava ein fólkaskúla, sum tað sømir einum nútíðarsamfelagi.

Vestmanna skúli hevði eftir okkara/mínum tykki tveir kostir í at velja:
1) At tiga og harvið góðtaka verandi støðu.
2) At gera vart við sína ónøgd.

Tey valdu tað seinna, og tað má verða upp til hvønn einstakan at meta um, hvørt val teirra var rætt ella skeivt.

Niðurstøða

At okkara samfelag skal hava ein vælvirkandi fólkaskúla, eru vit øll samd um. At politikararnir ikki hava viljað játtað nóg nógvan pening til fólkaskúlan, so hann klárar at liva upp til tey krøv, sum lógir, kunngerðir, sáttmálar o.a. seta er veruleiki. Og tað er ikki nakað nýtt. Ikki bara núverðandi løgting, men eisini undanfarin hava ikki raðfest fólkaskúlan nóg høgt, tíverri. Ført hevur verið fram, at játtanin er økt, men hetta sæst ikki aftur í tímatalinum til fólkaskúlan.

Kann verða, at soleiðis sum fólkaskúlin er skipaður í dag, er hann ov kostnaðarmikil fyri okkara lítla oyggjasamfelag, men tað er ein heilt annar spurningur, sum ikki skal viðgerast her.

Landstýrismaðurin skuldi tikið leiðsluna í Vestmanna skúla í álvara, tá ið tey longu í mars vístu á trupulleikan viðvíkjandi tímajáttanini, sum tey saman við fleiri øðrum skúlum eru í.

Hann kundi vístvilja til at gjørt sítt til at loyst henda trupulleika í framtíðini.

Hann valdi í staðin ósakliga at leypa á lærarar og leiðarar, sum starvast innan fyri tað stýrið, sum hann sjálvur hevur ábyrgdina av. Tað avdúkar meira hugburðin hjá landstýrismanninum, enn tað sigur nakað um tey, sum standa fyri skotum.

Nevndin

Frá Føroya Lærarafelag

Føroya Lærarafelag átalar úttalilsini hjá Torbirni Jacobsen, landsstýrismanni í undirvísingarmálum í Sosialinum og Dimmalætting leygardagin 26. mai 2001.

Felagið átalar, at hægsti myndugleiki í fólkaskúlanum niðurger ávísar partar av tí lóg, sum hann sjálvur umsitur.

Tað er lítið sømiligt fyri landsstýrismannin í skúla- og mentamálum, at hann dregur tímabýtið inn í partapolitikk, í staðin fyri at viðgera henda trupuleika sakliga.

Føroya Lærarafelag átalar harafturat, at Torbjørn Jacobsen blandar yrki og privatlív saman og niðurger leiklutin hjá álitisfólkum felagsins.

Nevndin í Føroya Lærarafelag fer at taka støðu til, hvat meira skal gerast í hesum máli.

Føroya Lærarafelag

Fyribyrgingarráðið - spurningar og svar um tubbak: “At gevast”

Hví er tað so ringt at gevast at roykja?

Eitrið, sum er í tubbaki, er ikki minni turvelvandi enn heroin og kokain. Tá ið tú roykir tubbak, kveikjast mótstøðustøð í nervalagnum í heilanum. Tá ið móttøku-støðini ikki fáa nóg mikið av tubbakseitri, verður tú illa fyri. Kroppinum tørvar tubbakseitur bara til at føla seg vanligan.

Er vanligt, at tú merkir, at tú roynir at gevast?

Ja nógv ymisk merki hoyra vanliga til, tá ið tú roynir at gevast. Ikki øll føla tað sama, nøkrum fellir tað merkilliga lætt. Hjá øðrum stendur ikki so væl til í nakrar dagar.

Hvørji felagseyðkenni eru, og hvat fái eg gjørt, so eg megni tað?

Verður tú erkvisin - far ein gongutúr, far undir heitt brúsubað, anda djúpan, jagla tyggigummi við tubbakseitri í.

Verður tú eitt sindur í ørðviti - førka teg eitt sindur spakuligari, skift støðu spakiligari.

Fært tú ilt í høvdið - anda djúpan, fá tær eina aspirin.

Møðist tú - síggj til, at tú fært ein góðan svøvn, fá tær ein eykablund, royn og slepp tær undan trýsti, jagla tyggigummi við tubbakseitri í.

Kemur svøvnloysi á teg - fá tær einki kaffievni eftir klokkan 18.00, anda djúpan.

Fert tú at hosta - drekk nógv vatn, fá tær hostabomm ella kandissukur.

Fært tú ikki savnað tankarnar - royn at lætta um arbeiðsbyrðuna í nakrar dagar, slepp tær undan trýsti.

Broytist sodningin - drekk nógv vatn, et frukt og grønmeti saman við matinum, tú etur.

Føler tú svongd - drekk nógv vatn, hav munnbitar hjá tær, sum ikki eru fullir av kalorium og feitti.

Leingist tær eftir tubbaki - halt ímóti neyðini; neyðin fjarar burtur.

Standardline Miditower
P130-31-L
Pentium 4 1,3 GHz Geril • 128 MB RDRAM PC600 • 40 GB harddisk • 32MB nVidia Geforce2 MX grafikkort v/TV out • 12xDVD drev við forritum, disklastað, 16 bit integrerað ljóðkort, standard hátalari • 56K internt DATA/FAX riser modem • Microsoft Windows MILLENIUM DK • Microsoft Works Suite 2000*: Word 2000, Works 2000, Encarta World Atlas 2000, Picture it! 2000, Autoroute Express 2000 • Microsoft spæl • Standard knappaborð • Wheel mús • 1 ára garanti • 17" skermur
Kr. 18.495,-


SMS · Tel 353537 · Fax 353536 · E-mail: electr@post.olivant.fo